# Havnar Róðrarfelag meiri sigrar enn í seks ár

**Í Hósvík vann HR tríggjar kappingar, og samanhaldið og styrkin í stóra høvuðsstaðar felagnum tykjast vera betri, enn tey hava verið í fleiri ár**

SIGURSSÆLIR
*Jóannes Hansen*

Tað er gott lag í Havnar Róðrarfelag. Tað hevur gingið væl higartil í ár, og leygardagin trumfaðu teir í Álakeri orduliga. Í trimum av teimum seks FM kappingunum vóru bátar hjá Havnar Róðrarfelag fremstir, og at Havnin er so væl fyri í kappróðri, sum høvuðsstaðurin ikki hevur verið tey seinastu árini, varð undirstrikað av, at Jarnbardur, sum hoyrir til Róðrarfelagið Knørr í høvuðsstaðnum, vann eina av teimum trimum kappingunum, sum HR ikki vann.

– Jú, lagið er gott, og tað er hugaligt at vera í felagnum nú. Leygarkvøldið, tá bátarnir komu suður aftur, vóru tað fleiri fólk í neystinum. Vit hava altíð eitt lítið ábit, tá manningarnar koma aftur, og sjálvandi er lagið serliga gott, tá tað eydnast so væl, sum tað gjørdi hesa ferð.

Tað er skrivaran í Havnar Róðrarfelag og ein av teimum, sum seinastu árini hava verið hollir stuðlar undir felagnum, sum vit tosa við. Hann eitur Rúni Persson.

Í fjør vann Havnarbáturin allar FM kappingarnar, men annars stóðu bátarnir hjá HR seg ikki serliga væl. Í fyrraárið átti HR ongan FM vinnara. Í 1999 vann Ørvur FM, í 1998 átti HR ongan FM vinnara, í 1997 vann Drekin við dreingjum FM, og so var tað 1996, tá HR rættuliga var á aldukambinum, og fýra manningar hjá teimum vórðu meistarar: Sílið við gentum, Drekin við dreingjum, Gongurólvur við monnum og Havnarbáturin.

Hvør er uppskriftin uppá, at tað nú vignast so væl?

– Einki ávist, men ivaleyst ein røð av viðurskiftum, sum hava við sær, at tað eru okkara manningar, sum vinna í ár. Marginalirnar, sum vit hava saknað seinastu árini, hava verið við okkum í ár. Og so hevur tað stóran týdning, at vit hava betri tak á venjingini hjá teimum yngru, enn vit hava havt seinnu árini.

*Hvussu tá?*

– Vagnur Michelsen hevur í fleiri ár stimað saman við Havnarbátinum, tá hann hevur vant. Undan hesum kappingarárinum heittu vit í nevndini á hann um at stima saman við yngru manningunum. Tað hevur hann gjørt, og tað er einki at ivast í, at ráðini og vinkini, sum hann hevur givið teimum, hava hjálpt væl til, so vit hava fingið betri úrslit, enn vit hava havt tey seinastu árini, heldur Rúni Persson.

### Stór luttøka

Rúni Persson undirstrikar, at hóast tað úrslitaliga ikki hevur roynst so væl tey seinastu árini, sum tað onkuntíð hevur gjørt fyrr, so hevur felagslívið í Havnar Róðrarfelag verið gott, og áhugin fyri at luttaka hevur verið støðugur.

– At áhugin er stórur sæst aftur í luttøkutalinum hjá okkum. Í dreingja– og gentukappingini eiga vit tvær manningar í hvørjari – Drekan og Sílið. Vit hava ein nýggjan Gongurólv og so Víking, sum er gamli Gongurólvur. At siga at hann er gamal er kanska at taka í so rívan til, tí tað eru bara tvey ár, síðani vit fingu tað 6–mannafarið. Í hesi vikuni fáa vit eitt nýtt 8–mannafar, og so er tað Havnarbáturin.

Rúni Persson heldur, at grundarlagið undir góðu úrslitunum í ár fyri ein stóran part varð lagt í fjør og í fyrraárið.

– Onkuntíð verða tey bæði undanfarnu árini í felagnum kallað hálv kreppuár. Havnarbáturin vann hvørja ferð í fjør, men hjá øllum hinum manningunum gekk tað einki serligt. Men hóast tað ikki skarst nakað serligt, so gjørdist samanhaldið uppaftur betri, og tað skal til, um úrslit skulu spyrjast burturúr.

### Sígga allar róðrarnar

Rúni Persson hevur verið virkin í Havnar Róðrarfelag seinastu 6–7 árini. Eitt árið róði hann, men síðani hevur hann verið upptikin av tí, sum er rundanum. Síðani í 1995 hevur hann tikið flestu FM róðrarnar upp á video. Tað eru brot úr hesum upptøkunum, sum eru at síggja í Degi og viku tíðliga í vikuni (tey eru fleiri, sum halda, at tað hevði ikki verið annað enn rímuligt, at longri brot og kanska allir róðrarnir á tamb vórðu vístir).

– Tá vit koma aftur frá stevnunum verða allir róðrarnir vístir í neystinum hjá okkum. So verður prátað og mett um, hvussu tað gekst, og hvat kundi havt verið øðrvísi, og hvussu tað man fara at ganga næstu ferð. Hetta er sera hugnaligt, og tað er týðuligt, at trivnaðurin í felagnum er góður. Tað er týdningarmikið eisini, tá úrslitini ikki eru tey, sum man hevði vónað og kanska eisini roknað við. Tað ræður um at hava motivatiónina í ordan, og tað hevur ikki bilað við tí í okkara felagi, heldur Rúni Persson.

# Klaksvíkingar hava ikki mist mótið

**Fyri fyrstu ferð síðani 2000 var í Hósvík eingin manning úr Klaksvík ovast á sigursskamlinum**

SIGURSLEYSIR
*Jóannes Hansen*



*Hóast ongin klaksvíksbátur vann hesaferð, so hevur Martin Venned gott mót uppá komandi róðrarnar*

Størstu framgongdina í kappróðri seinastu tvey árini munnu klaksvíkingar hava havt. Í fjør vunnu tríggjar manningar hjá teimum FM, og tað var heilt óvanligt, so stórur var áhugin millum stuðlarnar at fylgja við og taka ímóti, tá bátar og manningar komu aftur av stevnum og søkum við gulli og skreyti.

Nú hevur ikki hilnast so væl. Á norðoyarstevnu vunnu tvær manningar, á Skálafjørðinum vann ein manning, og í Hósvík áttu klaksvíkingar fyri fyrstu ferð síðani í 2000 onga manning, sum kom fyrst á mál.

– Men vit hava ikki mist mótið, og hóast vit ikki hava vunnið so nógv í ár, so halda vit framvegis, at tað gongur rætta vegin. Hetta skal skiljast soleiðis, at meðan vit í fjør bara áttu triggjar manningar, sum vunnu, og so onga aðra manning, sum gjørdi seg galdandi, so hava vit nógv størri breidd í ár. Tað hava úrslitini eisini víst.

Tað er Martin Venned, sum vit tosa við. Hann hevur ábyrgdina av allari venjingini hjá Klaksvíkar Róðrarfelag. Hann er sjálvur við til at manna 10–mannafarið Klaksvíking, og hann hevur gott mót um, at manningarnar hjá klaksvíkingum framvegis kunnu gera seg galdandi.

– Í fjør vóru tað fyrst og fremst konufólkini, sum vunnu. Nú eru fleiri mannfólkamanningar komnar upp millum tær bestu. Vit fara á jóansøku við fimm manningum, sum vit vita kunnu blanda seg í stríðið um fremstu plássini. Tað er sera hugaligt. Um vit fara at vinna, dugi eg ikki at siga. Tað valdast um fleiri viðurskifti, men vit hava avgjørt møguleika at vera við í kappingini.

*Men tit vunnu nógv í fjør?*

– Kanska onkur helt tað vera lætt at vinna, tá tað gekst so væl hjá okkum í fjør. Eg haldi, at kappingin er vorðin uppaftur størri, enn hon var í fjør. Tá roknaðu hini kanska ikki so nógv við okkum. Tað bar til at vinna, tí venjingarstøðan kanska var betri, enn hon var hjá fleiri av hinum, men soleiðis er tað ikki í ár. Í øllum kappingunum eru tað fleiri manningar, sum eru sera væl fyri, heldur Martin Venned.

Manningarnar, sum Martin Venned hevur ábyrgdina av, fyrireika seg til jóansøkuna og til hinar báðar kappingarnar, sum framvegis eru eftir, og Martin heldur, at tað er so mikið tætt í kappingunum, at tríggjar av manningunum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag framvegis hava møguleika at vinna FM.

– Men so skal væl vita við. Tað er sera torført at endurtaka eitt sovorðið róðrarár, sum manningarnar hjá okkum høvdu í fjør. Men hugburðurin er góður.

Tú ert ikki bangin fyri, at tað fer at detta niður fyri hjá tykkum, nú tað ikki hevur hilnast so væl í ár?

– Avgjørt ikki. Tey ungu eru við at koma fyri seg, og eg ivist ikki í, at kappróðurin í Klaksvik eisini fer at hava tað gott komandi árini.



# Fimm føroysk met sett í FM-kappingini

**Svimjararnir eru væl fyri, og longu nú hava seks teirra klárað kravtíðina til oyggjaleikirnar næsta ár.**

SVIMJING
*Páll Holm Johannesen*

Tað plagar at vera heldur soltið við føroyskum metum, tá føroysku svimjararnir ikki hava havt oyggjaleikirnar at síggja fram til. Tá oyggjarleikirnir bert eru á øðrum hvørjum ári, hevur tað verið ein sannroynd, at svimjararnir ikki hava verið líka væl fyri, sum tá oyggjaleikirnir standa fyri durum. Eftir FM kappingina um vikuskiftið tykist broyting verða komin í, tí heili fimm nðggj føroysk met vórðu sett, umframt nógv bólkamet.

### Útisetarnir væl fyri

Til FM kappingina vóru Asbjørn Hansen og Eivind Eysturoy komnir úr Danmark at kappast. Báðir svimja í Esbjerg, og ikki kann sigast annað, enn at væl kom burtur úr. Bæði Eivind og Asbjørn áttu fýra av teimum fimm nðggju metunum. Eivind Eysturoy setti met í 50- og 100 metur rygg, og Asbjørn Hansen setti nðggj føroysk met í 50- og 100 metur firvald.

Í 50 metra frí betraði Eivind sína egnu tíð, meðan metini í 50-og 100 metra rygg vórðu tikin frá Dia Jacobsen. Serliga metini í 50- og 100 metrar rygg vórðu betrað, har Eivind tók ávíkavist 50 og 71 hundraðapartar av teimum gomlu metunum.

Í firvaldssvimjingini betraði Asbjørn eisini munandi um gomlu metini. Á 100 metrum svam hann meira eitt sekund skjótari enn gamla metið, og á 50 metrum tók hann eisini av hálvt sekund av gamla metinum. Fimta føroyska metið setti Shaila Millum Garðarnar, tá hon á 100 metur frí betraði um metið hjá Benthe Sikivat Andersen við sjey hundraðapørtum.

Eisini unga Malan Michelsen kom heim úr Danmark til FM kappingina, og hon gjørdi ikki mætari enn at seta heili átta nðggj met í sínum aldursbólki.

### Seks klár til oyggjaleikirnar

Hóast oyggjaleikirnir ikki eru fyrr næsta summar, so hava seks svimjarar longu klárað kravtíðurnar til oyggjaleikirnar á Guernsey. Teir seks svimjarnir eru: Kristoffur Hentze HS, Eivind Eysturoy HS, Asbjørn Hansen HS, Benthe Sikivat. Andersen TS, Shaila millum Garðarnar TS og Malan Michelsen TS. Fyrireikingarnar til oyggjaleikirnar byrja í august-september, tá venjingin aftur fer í gongd. Í løtuni eru nógvir ungir og evnaríkir svimjarar, og eftir summarfrítíðina vónar landsliðsvenjarin, at nakrir av teimum royndaru svimjarunum aftur fara undir at venja, so landsliðið verður so sterkt sum møguligt, tá farið verður undir oyggjaleikirnar næsta summar.

### Landsliðsvenjarin væl nøgdur

Landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, er væl nøgdur við kappingina:

- Hon var væl skipað , og eydnaðist væl í allar mátar. Eg eri serliga fegin um, at tann miðvísa venjingin hevur givið úrslit.

Petur Heðin á Fløtti vísir á, at tað er sera óvanligt, at føroysk met verða sett eitt ár undan oyggjaleikunum. Um tað er Íslands- túrurin, ið er gularótin hjá svimjarunum, veit landsliðsvenjarin ikki, men hetta seinasta árið hevur verið vant dúgliga, og hetta prógvaðu góðu tíðirnir um vikuskiftið eisini.

# KÍ- sigursrøðin heldur fram

**Aftur hetta vikuskiftið vundu KÍ kvinnurnar úr mótstøðuliðnum, og lítið røkist fyri, at nakað av hinum liðunum klárar at standa klaksvíkskvinnunum kurl.**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Nú landskappingin hjá kvinnunum er nærum hálvrunnin, bendir alt á, at KÍ-kvinnurnar aftur í ár stevna ímóti meistaraheitinum. Klaksvíkskvinnurnar eru enn ikki farnar av vøllinum, uttan at hava ognað sær trý stig.

Sunnudagin vóru gøtukvinnur á vitjan í Klaksvík, og botnliðið úr Gøtu varð sent um fjørðin aftur við einum stórtapi. KÍ vann heili 9-2 á GÍ, eftir hálvleikstøðuna 5-2. Úr Klaksvík verður sagt, at dysturin var einvegis ferðsla á GÍ-málið, og sigurin kundi verid væl størri, um KÍ- kvinnurnar vóru nærlagdari framman fyri GÍ- málið.

### Sjey ferðir Rannvá

Stóri leikarin í Klaksvík sunnudagin var Rannvá Andreasen, sum skeyt heili sjey av teimum níggju málunum hjá KÍ. Eftir at GÍ óvæntað legði seg á odda tíðliga í dystinum, vaknaðu KÍ kvinnurnar, og løgdu stórt trýst á GÍ. Trðstið gav eisini úrslit, tí tá farið var til hálvleik, var KÍ omaná við greiðari 5-2 leiðslu. Í trimum av málunum í fyrra hálvleiki, hevði Rannvá seinasta fót á, meðan Bára Skaale og Malena Josephsen skutu hini bæði. Málini hjá GÍ skutu Heidi Jacobsen og Hansa Mikkelsen.

Kí helt fram at trýsta GÍ-liðið í seinna hálvleiki, og nógvir møguleikar spurdust burturúr, men vantandi nærlagni framman fyri GÍ málinum var høvuðsorsøkin til, at sigurin ikki gjørdist uppaftur størri. Úr Klaksvík frætta vit, at serliga Malena Josephsen var óheppin við skotroyndunum á málið.

Álopsfelagin hjá Malenu, Rannvá Andreasen, gjørdi harafturímóti eitt rættiligt hál sunnudagin. Aftrat teimum trimum málunum í fyrra hálvleiki, gjørdi hon øll fýra KÍ- málini í seinna hálvleiki, og hevur sostatt lagt seg trygt á odda á máltindinum í kvinnudeildini.

Við greiða sigrinum á GÍ hevur KÍ nærum tryggjað sær fyrsta plássið, hóast tad eru tvey umførð eftir at leika. B36 hevur enn møguleikan at enda ovast, men málmunurin er somikið stórur, at hetta tykist lítið sannlíkt. Ósigurin í Klaksvík sunnudagin hevði við sær, at GÍ við vissu endar niðast í 1. deild, og skal nú leika ein upp- og niðurflytingardyst ímóti nummar tvey í aðru deild.

# Føroya Sparikassi og Flogbóltssambandið nýggjan sáttmála

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Flogbóltssamband Føroya fekk í 1999 beint undan Oyggjaleikunum á Gotlandi sáttmála við Føroya Sparikassa. At tað gjørdist júst Føroya Sparikassi var ikki so løgið, tí Føroya Sparikassi stuðlaði Flogbóltssambandinum leingi í 80'árunum, og tá ið nýggjur høvuðsstuðul skuldi finnast, varð fyrst farið til Føroya Sparikassa.

Við hesum sáttmálanum í viðførinum varð farið til Oyggjaleikirnar á Gotlandi, og úrslit gjørdist óføra gott. Sáttmálin var fyri alt virksemi hjá Flogbóltssambandinum, men búmerkið hjá høvuðsstuðlinum sæst á øllum brævbjálvum, brævørkum, dómaraseðlum v.m., og er við í øllum tiltøkum hjá Flogbóltssambandinum. Hesin sáttmálin gekk fram til 31.12.2001.

Báðir partar vóru so mikið væl nøgdir við sáttmálan, at áhugin at leingja hann var stórur, og nú er so nýggjur sáttmáli undirskrivaður, og hevur tað líkasum alla tíðina ligið klárt, at samstarvið skuldi halda fram.

Nýggi sáttmálin líkist tí gamla. Føroya Sparikassi skal framhaldandi vera høvuðsstuðul. Búmerkið hjá Sparikassanum verður framvegis við í øllum virksemi hjá Flogbóltssambandinum.

### Nógv ung

Nógv børn og ung spæla flogbólt, og á hesum økinum verður samstarvið styrkt. Eisini verður samstarvið tættari, tá ið talan er um kappingar og onnur serlig tiltøk. Millum annað hevur Sparikassin latið tilfar til venjaraskeið, ungdómskappingar v.m.

Flogbóltssambandið væntar sær sera nógv av nýggju avtaluni. Hon gevur fíggjarliga nógv av sær og tryggjar millum annað, at A-landsliðini kunnu fyrireika seg væl til næstu Oyggjaleikir. Saman við veddingarpeninginum og stuðlinum frá løgtinginum er avtalan við Føroya Sparikassa høvuðsinntøkan hjá Flogbóltssambandinum.

Virksemið hjá Flogbóltssambandinum er stórt. U-18 landsliðini fara í august til norðurlendska meistaraskapin. Stig verða júst nú tikin til at fara undir venjingar við A-landsliðunum aftur. Í heyst fara U-14 liðini undir sínar venjingar, og í september verða dómaraskeið á skránni eins og venjaraskeiðini eru komin í fasta legu. Við virksemi sum hesum er greitt, at góðir stuðulssáttmálar eru týdningarmiklir, men hetta virksemið ger eisini, at flogbólturin hevur vunnið seg nógv fram, og er lýsingarvirðið tí eisini økt munandi.

Nýggi sáttmálin við Føroya Sparikassa er galdandi fram til 31. desember í 2003.

# Svimjilandsliðið úttikið

**Átta svimjarar sleppa at royna seg í kapping í Íslandi í næstum**

SVIMJING
*Páll Holm Johannesen*

Eftir FM kappingina sunnukvøldið, boðaði landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, frá, at átta svimjarar eru úttiknir til kapping í Íslandi fyrst í juli. Hópurin telur fimm svimjarar úr Havnar Svimjifelag, tveir úr Tvøroyar Svimjifelag og ein úr Fuglafjarðar Svimjifelag.

Svimjararnir úr Havnar Svimjifelag eru Jóannes á Fløtti, Andrass Thomsen, Aksal Holm Norðfoss, Kristoffur Hentze og Elisabeth Rasmussen. Úr Tvøroyrar Svimjifelag eru Benthe Sikivat Andersen og Sheila millum Garðarnar, og Karina Petersen úr Fuglafjarðar Svimjifelag.

Talan er kapping um íslendska meistaraheitið, har gestasvimjarar úr fleiri londum eru boðnir vid. Kappingin fer fram í Laugardali, og svomið verður uttandura í 50 metra hyljum. Kappingin verður um vikuskiftið 5.-7. juli.